# ítróttur

Nr. 24 • mikudagur • 5. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## HB og Føroya Bjór samstarva

SAMSTARVSAVTALA
*Páll Holm Johannesen*

Álítandi keldur í HB vilja vera við, at Føroya Bjór komandi kappingarár skal verða høvuðsstuðul hjá 1.liði felagsins. Týsdagin, eftir evsta mark okkara, varð boðað frá tíðindafundi í HB, har væntandi nýggi høvuðsstuðulin varð kunngjørdur.

Meistaraliðið hevur seinastu árini havt Føroya Banka sum høvuðsstuðul, men tann sáttmálin gekk út 1. januar í ár. Felagið hevur leita eftir nýggjum høvuðsstuðli, sum eftir øllum at døma verður Føroya Bjór

**Helst eisini Carsten From**

Umframt nýggjan høvuðsstuðul, skal HB eisini kunngera tveir nýggjar leikarar fyri komandi kappingarár á tíðindafundinum. Leingi hevur verið gitt um, at danski áleyparin, Carsten From, verður at síggja á HB-liðnum í ár.

Hvør hin leikarin verður er enn óvist. Gitingar hava verið, um ein danskan leikara, og at Símun Eliassen skal venda aftur til HB. Hvussu verður og ikki, so vera vit klókari eftir tíðindafundin.

## Tryggingin stuðlar NSÍ aftur í ár



*NSÍ-samskiparin Ian Højgaard og Henry Olsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar geva hvørjum øðrum hondina upp á samstarv fimta árið á rað. Aftanfyri standa NSÍ-ararnir Helgi L. Petersen og Jens Martin Knudsen í nýggju búnunum hjá NSÍ*

Tíðindaskriv

Seinnapartin mánadagin skrivaðu NSÍ og Tryggingarfelagið Føroyar undir nýggjan stuðulssáttmála. Samstarvið teirra millum gongur nú á fimta ári.

At kappingarárið í fjør var tað besta hjá NSÍ nakrantíð, er neyvan neyðugt at endurtaka, men so mikið meira var tað ein sannroynd. Og nú skjøtil verður settur á eitt nýtt, er ið hvussu er ein fyritreyt fyri góðum úrsliti til staðar.

Einki gerst uttan gott fíggjarligt grundarlag, og ein týðandi partur av hesum grundarlagi hevur síðstu fýra árini verið stuðulsavtalan millum NSÍ og Tryggingarfelagið Føroyar.

Seinnapartin mánadagin varð henda avtala endurnýggjað, og sostatt er greitt, at Tryggingarfelagið Føroyar fimta árið á rað verður høvuðsstuðul hjá NSÍ.

– Vit valdu at halda fram við samstarvinum við NSÍ, tí vit hava verið væl nøgdir við hesi fýra árini, vit hava samstarvað, sigur Henry Olsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Góðu úrslitini hjá NSÍ í fjør gjørdu tað bara enn meira upplagt at halda fram, og trúgva at framhaldandi samstarvið við NSÍ fer at gera Tryggingarfelagið Føroyar uppaftur meira sjónligt.

### Felagið í stórari menning

Sum undanfarnu árini fevnir sáttmálin um eina grundupphædd, umframt bonus – alt eftir hvussu væl tað eydnast NSÍ at røkka sínum høgu málum fyri komandi kappingarárið. Somuleiðis gevur sáttmálin NSÍ møguleika at brúka hølini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Saltangará til taktikkfundir og annað.

Samskiparin hjá NSÍ, Ian Højgaard, gevur felagsins vegna til kennar, at eisini í NSÍ eru tey fegin um samstarvið undanfarnu árini – og ikki minst, tað heldur fram í ár við:

– Felagið hevur verið í stórari menning hesi seinnu árini, og tað er ikki minst samstarvinum við Tryggingarfelagið Føroyar fyri at takka, sigur NSÍ-samskiparin.

– At hava eitt gott fíggjarligt grundarlag undir arbeiðinum hevur størri týdning enn nakrantíð. Ikki minst, nú UEFA og aðrir fótbóltsmyndugleikar eru farnir at seta alsamt størri krøv til fótbóltsfeløgini, eisini her í Føroyum.

Síðani undanfarna kappingarár eru einstakir spælarar givnir ella farnir til onnur feløg, men hóast lítil og eingin styrkur er komin til felagið uttanífrá, hava tey í NSÍ góðar vónir um komandi kappingarárið.

Venjarin, sum aftur í ár er Jógvan Martin Olsen, hevur longu havt spælararnar savnaðar til nakrar venjingar, og einir 20-25 hava spælarar hava verið við hvørja ferð.

## Jón Johannesen venja TB

**Tað er enn óvist, hvat felag Óli Johannesen ætlar at umboða í ár. Hann er so byrjaður at venja við TB**

VENJARASTARV
*Páll Holm Johannesen*

TB hevur sett venjara fyri komandi kappingarár. Tað verður Jón Johannesen sum skal standa á odda fyri tvøramonnum í ár. Saman við Jón, skal ein onnur TB-kempa Pól F. Joensen hjálpa elsta felagnum í landinum uppaftur í 1.deild.

Jón Johannesen var saman við bróðurinum, Óla, venjari seinnu hálvu í fjør, og hann hevur játtað at taka enn eitt tørn í venjarastarvinum á Tvøroyri.

TB vandi fyri fyrstu ferð leygardagin, og heili 25 mans møttu. Einasti útlendingur á liðnum frá í fjør verður Vladimir. Sasha er enn á Tvøroyri, men enn er óvist um hann verður at síggja á TB-liðnum í ár. Báðir onglendingarnar eru farnir av landinum, og teir vera ikki við í ár.

Sumbingarnir Remi Thomsen og Sonni Kjærbo hava báðir valt at royna seg á Tvøroyri í ár, eftir at hava spælt við Sumba tey síðstu árini.

Landliðsleikarin, Óli Johannesen, hevur verið settur í samband við fleiri feløg, men er onki ítøkiligt komið burturúr. Hann hevur luttikið í venjingunum hjá TB higartil, men enn vita teir ikki av Tvøroyri, um ætlar at leika við TB í ár.



*TB hevur sett Jón Johannesen í venjarastarvið, men enn er óvist, hvar bróðurin Óli Johannesen spælir komandi kappingarár.*

*Mynd:Savnsmynd*



## Jarnbardur fyrireikar seg til Scilly-oyggjarnar




*Kappróðrarbátarnir á World Pilot Gig Championship víkja frá føroyska kappróðrarbátinum, og tí sambandi venur Jarnbardur í Brendan, sum minnir nógv um bátarnar, nýttir vera á Scilly-oyggjunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Hóast venjingin hevur verið darvað av verðrinum, so hevur manningin á Jarnbardi gott treyst, og gleða tær seg til at sleppa at venja meir í bátinum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast venjingin er nóg v darvað av veðrinum, so hevur manningin á Jarnbardi gótt treyst, og gleða tær seg til ljósari verður í veðrinum.**

KAPPRÓÐUR
*Páll Holm Johannesen*

Kappróðrarfólkið er so smátt farið í holt við venjingarnar til kappróðrarárið í ár. Venjingin hesa ársins tíð fevnir serliga um tað kropsliga, har manningarnar leggja botnin, áðrenn kappróðrarbátarnir verða flotaðir í apríl mánað.

Meðan flestu kappróðrarfólkini ikki byrja venjingina fyrr enn um mánaðarskiftið januar- februar, so hevur kvinnumanningin á Jarnbardi verið í gongd síðan í november mánað. 6-mannafarið hjá róðrarfelagnum Knørri í Havn skal nevnliga kappast á Scilly-oyggjunum fyrst í meimánað, tá tær skulu luttaka í World Pilot Gig Championship.

Rættin til, at luttaka í World Pilot Gig Championship á Scilly-oyggjunum, vann Jarnbardur, tá tær í fjør vunnu allar FM-róðrarnar. Allar manningar, fyriuttan 5-mannaførðini, kappast um rættin at luttaka á Scilly-oyggjunum, og í fjør stóð so Jarnbardur seg best í tí kappingini. Skoytast kann uppí, at 5-mannafarið á Sílinum eisini vann allar FM-róðrarnar í fjør, og fyri tað, sluppu tær at royna seg í kapping í Danmark.

### Samansett manning

Manningin á Jarnbardi til kappingina á Scilly er samansett úr fleiri ymiskum 6-mannaførum. Ymiskar orsøkir hava havt við sær, at tað einans eru tríggjar av Jarnbardi, Ið vunnu FM í fjør. Umframt ær tríggjar av Jarnbardi, so eru tvær av Gongurálvi, og hvør sín av Páll Fanga og Riddarnum.

Ásetingin frá Róðrarsambandi Føroya sigur, at um vinnaramanningin ikki sjálv fær mannað bátin, so skal róðrarfólk finnast av øðrum bátum. Fyrst verður roynt á manningini, sum endaði nummar tvey í FM, og eydnast heldur ikki tað, so frá nummar trý os.fr til báturin er mannaður. Hvussu er og ikki, so er manningin á Jarnbardi til World Pilot Gig Championship henda: Jannie Dam Jacobsen, Kristianna Dahl Øster, Eivy Olsen, Rannvá Madsdóttir, Anna Mohr Jacobsen, Petra Hansen og Kerstin Rasmussen.

### Venjingin darvað av veðrinum

Bátarnir, kappast verður við á Scilly-oyggjunum, líkjast ikki føroysku kappróðrarbátunum. Hetta hevur eisini við sær, at stórur partur av venjingini fer til at venja seg við bátin. Vant verður í bátinum Brendan, sum minnir um kappróðrarbátarnir, sum nýttir vera í kappingini á Scilly. Stórur dentur er lagdur á teknisku venjingina, tí róðrarlagið skilir seg frá tí, vit kenna í Føroyum. Tað ræður tí um at leggja seg eftir rætta teknikkinum, verður sagt av Jarnbardi

Umframt tað tekniska, so er týdningarmikið at vera væl fyri kropsliga, tí teinarnir í World Gig Championship liggja ímillum 2000-3000 metrar. Venjingarætlanin hevur verið, at vant verður í batinum bátinum tríggjar ferðir um vikuna og tvær ferðir á landi. Ringa kava veðrið hevur darvað venjingini nógv, og tí hevur mesta av venjingini higartil verið á landi. Vikuskiftini verða nýtt til at rógva langar teinar, og vanliga gongur leiðin út á Noylsoyarfjørð

Hóast Jarnbardur í løtuni er nakað afturúr í venjingarætlanini, so hevur manningin gott treysti, og siga seg gleða seg til ljósari verður í veðrinum.Tá vera betri møguleikar at venja meir í bátinum, og tað er júst tað tær hava brúk fyri nú.

### Góðar vónir

Hóast langt er til kappingina á Scilly fyrst í mei-mánað, so gleðir manningin seg til kappingina. – Vit vera betri fyri hesa ferð, enn í 2000, og tí hava vit góðar vónir, um at tað skal fara at ganga væl, siga tær av Jarnbardi. Tær ásanna tó, at tað verður torført at enda heilt frammi í oddinum, tí fremstu bátarnir eru vanliga rættiliga væl fyri. – Fáa vit tað tekniska upp á pláss, og hava vit eitt sindur av hepni við okkum, so vóna vit at enda millum 10 teir fremstu bátarnar, leggur manningin á Jarnbandi afturat.

Annars hevur manningin á Jarnbardi eitt lítið hjartasuff til føroyskar fjølmiðlar, tí seinastu árini hava teir gjørt alt ov lítið burturúr kappingini á Scilly.- Hetta er størsta kapping, har føroysk kappróðrarfólk luttaka, og tí kundi hugsa okkum, at fjølmiðlarnir varpaðu meiri ljós á kappingina.

Hetta er størsta gularótin hjá kappróðrarfólki í Føroyum, og umframt at umboða okkara róðrarfelag, so umboða vit sanniliga eisini tjóðina, og tí burdi kappingin havt áhuga millum fólk, sigur manningin á Jarnbardi at enda.

**Fakta**

Føroyingar hava luttikið í World Pilot Gig Championship á Scilly –oyggunum síðan 1998.

Luttøkan er gjørd í samstarvið millum Róðrarsamband Føroya og Amerada Hess.

Okkurt árið hava tvær manningar verið umboðaðar, men av fíggjarligum áðum verður tað bert Jarnbardur sum luttekur í ár.

1998: Vestmenningur
1999: Eysturoyingur
2000: Eysturoyingur og Jarnbardur
2001: Argjabáturin og Frúgvin
2002: Havnarbáturin og Páll Fangi
2003: Jarnbardur